

*Ein filmur um familjumannin Lars Løkke Rasmussen fær atfinningar í Danmark. Valið er ov nær til slíkar filmar, siga serfrøðingar*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Familjumaðurin kann vinna valið

**Ein dokumentarfilmur um danska forsætisráðharran, Lars Løkke Rasmussen, har hann verður lýstur sum familjumaður, fær atfinningar av donskum serfrøðingum, tí hetta telur til hansara fyrimuns nú fólkatingsvalið nærkast**

Rólant Waag Dam

Mánakvøldið vísir sjónvarpsrásin DR2 ein dokumentarfilm um Lars Løkke Rasmussen sum familjumann. Ein filmur, har danski forsætisráðharrin hvørki tosar um búskaparpolitik ella eftirløn, men har hyggjarin fær eitt innlit í gerandisdagin hjá familjuni Løkke Rasmussen.

Men hetta fær ikki blíða móttøku millum fleiri danir. Kasper Møller Hansen, professari, á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, sigur við danskar miðlar, at tað er problematiskt, at Lars Løkke Rasmussen fær ein hálvan tíma í bestu senditíð so tætt upp undir fólkatingsvalið.

- Tá kanst tú eisini spyrja, um ikki Helle Thorning-Schmidt, Pia Kjærsgaard og aðrir floksformenn ikki eisini áttu at fingið ein hálvan tíma í bestu senditíð, tí í slíkum sendingum tosar politikkarin beinleiðis til veljaran, sigur Kasper Møller Hansen, professari í stjórnmálafrøði á lærda háskúlanum í Keypmannahavn.

Kasper Møller Hansen vísir á, at talan ikki er um kritiskan journalistik og um valið longu var útskrivað, hevði DR2 ivaleyst ikki víst filmin. Júst hetta metir DR2 eisini vera ógvuliga avgerandi, tí um valið var útskrivað, høvdu tey endurskoðað skránna og umhugsað ikki at sent sendingina.

Men valið er ikki útskrivað og filmurin um, hvussu Lars Løkke Rasmussen fær tilveruna sum forsætisráðharri og familjumaður saman við føroysku Sólrun Løkke Rasmussen og børnum teirra at hanga saman, verður vístur mánakvøldið.





## Ráðgevi til Vinnuhúsið

Vil tú vera við til at bera verandi vinnu framá? Megnar tú at fara í dýbdina og at arbeiða breitt? Klárar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn og halda høvdið kalt? So er eitt spennandi starv at søkja í Vinnuhúsinum!

Nú ein av okkara ráðgevum hevur tikið við aðrari avbjóðing, søkir Føroya Arbeiðsgevarafelag eftir ráðgeva til Vinnuhúsið. Ráðgevin skal samskipa og ráðgeva vinnugreinafeløgum, m.a. Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Arbeiðið fevnir um at

- samskipa uppgávur fyri nevndir í nevndu vinnugreinafeløgum
- lýsa mál og gera frágreiðingar
- viðgera lógir og kunngerðir
- luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum
- vera við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum

Í hesum sambandi krevst tætt samskifti við leikarar í føroysku vinnuni og við myndugleikar.

Vit vænta, at tú

- hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir
- hevur kunnleika til føroyska vinnu og umsiting
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum

Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi.

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. januar 2011.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til stjóran, Maritu Rasmussen, tel. 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038, FO-110 Tórshavn

sansir.fo

Vinnuhúsið er felags heiti fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum umframt føroysku vinnufeløgini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning, sum gevur politiska ávirkan.
Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum, sí eisini www.industry.fo.

Smærugøta 9A // FO-100 Tórshavn // Tel: +298 30 99 00 // Fax: +298 30 99 01 // industry@industry.fo

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY